Beinir Johannesen
Magnus Rasmussen
Steffan Klein Poulsen
Bárður á Steig Nielsen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 96/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin) (Dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis: "(Strikan av undantaki fyri heimaflotan)"

2. § 1 verður orðað soleiðis:

   "**§ 1**

   Í løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin), verður § 2 orðað soleiðis: "**§ 2.** Veiðigjald skal ikki rindast av veiðu, tá rættindini at veiða eru keypt á uppboðssølu, og uppboðssølugjald skal rindast fyri kvotuna."

3. § 2, stk. 2 verður strikað.

Viðmerkingar:

Veiðigjaldslógin hevur eitt ár á baki, og heimsstøðan er rættiliga nógv broytt, síðani lógin kom í gildi. Stórar óvissur valda á marknaðinum, oljuprísirnir eru hækkaðir munandi, og tað er rentan eisini. Hetta tyngir munandi um raksturin hjá vinnuni. Eisini valda stórar óvissur um nøgdirnar, ið hesi skip fara at fiska. Kvotan í Barentshavinum hevur verið lækkandi, og fæst semja millum strandarlondini, lækka uppsjóvarkvoturnar allarhelst eisini. Tí metir man tað ikki vera rætt, at man longu nú fer at skrúva upp á gjøldini aftur.

Til nr. 1

Frágreiðandi heitið verður broytt, so tað samsvarar við broytingarnar í hesum uppskotinum.

Til nr. 2

Ásetingin um at strika undantikið fyri heimaflotan at rinda veiðigjald verður varðveitt, meðan allar aðrar broytingar, sum landsstýrismaðurin skjýtur upp at gera við uppskotinum, verða strikaðar, t.e. ásetingarnar um dagføring av gjøldum v.m.,

Til nr. 3

Hetta er ein broyting í stk. 2 í gildiskomuni, sum stendst av, at § 12 a, um at ávísur prosentpartur av veiðigjaldinum fellur til kommunurnar sambært hesum uppskotinum, verður strikað.

Á Løgtingi, 17. mai 2023

Beinir Johannesen Magnus Rasmussen

Steffan Klein Poulsen Bárður á Steig Nielsen Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur